Dimmalætting

Amtstidende for Færøerne

NR. 82. ONSDAG 13. OKTOBER 1965. 88. AARGANG.

19 júsk sóknarstýri hava áhuga fyri Faroe Airways flúgving —

FØROYSKA FELAGIÐ BJØDAR SÆR AT OPNA FLOGRUTU THISTED — STAUNING — ESBJERG — KJØPINHAVN

Frá tíðindamanni okkara
KJØPINHAVN, í gjár

Flogfelagið »Faroe Airways« hevur sum áður frásagt í Dimmalætting umhugsað at víðka rutuflúgving sína til eisini at umfata innanlanda flúgving í Damark, millum Jylland og Kjøpinhavn. Um henda ætlan kann verða framd er enn óvist, tí SAS og Luftfartsdirektoratet hava eisini eitt orð at siga í hesum máli.

Eftir sum G. Tranebjerg, forrætningsførari, upplýsir fyri tíðindamanni DIMMALÆTTINGar hevur Faroe Airways áhuga fyri at byrja eina sonevnda ringsrutu Thisted — Stauning — Esbjerg — Kjøpinhavn við einum DC 3 flogfari, fyribils einaferð dagliga, og vónin er at kunna byrja til várs. Felagið hevur svenskt flogfar, ið kann fáast fyri um 530.000 kr. uppá hondina.

Nærhendis Thisted í norðurvestara parti av Jyllandi er eingin flogvøllur, men roknað verður við, at flogvøllur verður gjørdur, um felagið fær loyvi at byrja hesa ætlaðu rutu.

Harafturímóti hava teir nýliga gjørt flogvøll í tí lítlu landsbygdini Stauning í Vesturjylland, har 19 kommunur hava tikið seg saman um slíkan flogvøll. Faroe Airways sendi leygardagin eitt DC 3 flogfar til Stauning og bjóðaði sóknarstýrisformonnum har nærhendis á »presentasjónsa«-flúgving fram við vestursteindini. Nú skulu sóknarstýrini umráða seg nærri, men fyribils tykjast tey øll at hava stóran áhuga fyri sókari flúgving, sum Faroe Airways bjóðar — Vesturjylland hevur altíð átt avbera ring flúgvulkindi.

Annað felag liggur framvið

Enn hevur føroyska flúgvufelagið ikki søkt um koncession til flogrutuna í Jylland, og varastjórin í Statens Luftfartsdirektorat, E. Rasmussen, sigur, at SAS hevur framlidnarættindi, og er einasta felag, ið higartil hevur átt koncessiónsrættindi til innanlandaflúgving í Danmark. Um SAS ikki vísir áhuga fyri málinum kann møguleiki vera hjá Faroe Airways ella hjá øðrum felag, t. d. Cimber Air í Sønderborg, sum hevur vist áhuga ikki fyri rutuflúgving, men fyri taxa-flúgving millum Stauning og Kjøpinhavn.

Endaliga avgerðin verður tikin av Ministeriet for offentlige arbejder. **F-p.**

P. M. Dam sygemeldt i folketinget

Folketingsmand P. M. Dam, der repræsenterer det færøske socialdemokrati i folketinget, har søgt sygeorlov.

Indtil videre er P. M. Dams stedfortræder, pastor Johan Nielsen, indtraadt i folketinget. Johan Nielsen der medens han endnu var præst i Klaksvig, repræsenterede Færøerne i een periode i tinget, er nu præst ved Filipskirken i København. Han blev nr. 2 blandt socialdemokraterne ved sidste folketingsvalg paa Færøerne.

— —

Folketingsmand P. M. Dam opholder sig her paa øerne under sin sygeorlov.

Sløk 800 tons av saltfiski seld til Noregs

Fleiri føroyskir linubátar hava í seinastuni ligið og bíðað uppá sølu til Italien, men einki er hent higartil — italienarar hava nýliga keypt biligan saltfisk frá russum og annars hava teir í summar ligið við rættiliga stórum goymslum.

Í staðin hevur Fiskasølan í gjár seilt fýra lastir av linufiski til Noregs, og 3 teir fyrstu báðarnir eru longu farnir avstað. Prisurin er £ 155 fyri tonnið.

Jákup B. við 240 og Jógvan Norði við 150 tonsum eru farnir til Kristiansund og H. O. Højgaard við 140 tonsum er farin til Aalesund.

Ætlandi fer Jógvan S. í dag sum fjórði báturin til Kristiansund við 200 tonsum.

LUKKULIG MAMMA! Sum longu frásagt átti Judith Nolsøe, kona Olav Groth Nolsøe í Dali, triburðar seinasta hósdag í øllum góðum. Hendingin hevur vakt stóran ans, bíðmur til mammuna og gávur til smádreingirnar báðar og gentuna komu út á hospitalstovuna sama dag og dagarnar eftir. — Her er mynd, tikin av mammu og teimum trimum nýføðingunum. (Bambus foto)

RHODESIA:

Løsrivelse ensbetydende med oprør fastslaar FN

SALISBURY, i gaar (AP)

I dyb spænding afventede Rhodesias 250.000 hvide og 3.800.000 farvede indbyggere i dag premierminister Ian Smiths hjemkomst fra de resultatløse forhandlinger i London om landets uafhængighed under den hvide befolknings herredømme. Smith forlod London med en erklæring om at »selvstændighed er afgjort det næste logiske skridt«.

Smith rejste hjem under en forstærket strøm af advarsler fra alle sider, og mens han sad i flyvemaskinen paa vej til Salisbury vedtog FN-generalforsamlingens formynderskabskomite med overvældende flertal at tilskynde Storbritannien til at »tage alle rødvendige skridt til at sætte en stopper for oprør« i tilfælde af, at Rhodesia bryder med Storbritannien og proklamerer sin uafhængighed for at bevare det hvide mindretals herredømme.

Kun apartheid-landet Sydafrika og kolonimagten Portugal kom Rhodesias hvide regering direkte til undsætning i FN ved at stemme mod resolutionen, der fremsattes af Nigeria paa den afro-asiatiske bloks vegne og paa tilskyndelse af USA, der ligesom Sovjet paa forhaand havde tilsagt sin støtte. Resolutionen talte ikke direkte om vævnet magt, men lod dog klart forstaa, at FN i givet fald vil sanktionere militær indgriben fra britisk side for at tvinge Rhodesias hvide til at opgive deres desperate planer.

FN-resolutionen lægger ogsaa op til saa at sige hele den øvrige verdens brud med Rhodesia, og dermed en iværksættelse af økonomisk blokade, hvis Smith og hans regering gør alvor af deres trusler.

Babylonisk forvirring

DET er, som tidligere bemærket her i bladet, ikke komplet ligegyldigt, hvordan prisniveauet arter sig. Faar prisdannelserne lov til at danne sig fuldkommen efter behag, vil i det lange løb den smule lontillæg, der følger med for den enkelte daglejer, i fuldt maal blive elimineret af de samtidigt stigende daglige udgifter plus de voksende offentlige udgifter, den forøgede indtægt i form af skatter og afgifter skal tilsvares.

Heroverfor anfører det regerende landstyres fornemste talerør »Dagblaðið«, at den uheldige prisudvikling er en direkte følge af det politiske samhørsforhold til Danmark, som medfører, at stigende danske varepriser har en særdeles direkte indflydelse paa den unormale forøgelse af leveomkostningerne her paa øerne. Hvilket vel skal forstaas saaledes, at havde vi ikke den politiske og økonomiske forbindelse med Danmark, som vi stadig har, ville prisudviklingen have været mere normal.

Men regeringsorganet »Dagblaðið«s paastand dementeres eftertrykkeligt af et andet regeringsorgan, »Tingakrossur«, som netop — efter at priskontrolraadet i samtlige blade har bekendtgjort raamaterialet, der ligger til grund for den sidste pristalsberegning — slaar fast, at den væsentligste aarsag til de sidste bratte prisstigninger paa Færøerne skyldes markedspriserne fortrinsvis for færøske varer!

De direkte ansvarlige for øernes politiske ledelse er — som det fremgaar heraf — aabenlyst dybt uenige i bedømmelsen af prisfordyrelsen. Den ene part giver prisudviklingen i Danmark og svort tilhørsforhold til Danmark hele ansvaret, medens den anden partner i landsstyret ved henvisning til det offentliggjorte pristalsmateriale mener, at hovedaarsagen til det voldsomt stigende prisniveau skal søges her paa øerne.

Der hersker, som man bl. a. heraf vil se, en rent babylonisk forvirring i de kredse, der er de raadende her i landet om, hvad der har skylden for hvad, og i mellemtiden gaar udviklingen fortsat sin skæve gang.

Sandheden turde vel nærmest være den, at der i Tinganæs sidder et styre, som bryder sig fejl om, hvad der sker med priser og alt muligt andet her i landet. Alt faar lov til at skotte sig selv, og landsstyret, der lader alting skotte sig selv, finder det derfor rimeligt og logisk, at saa maa ogsaa *det* faa lov til at skotte sig selv.

Undangongumenn og slóðbrótarar í Suðuroya siglingarsøgu

UM BYGDIRNAR VÁG OG PORKERI Í TIÐARSKEIÐNUM 1856—1940

Páll J. Nolsøe: Føroya Siglingarsøga II, 1856-1940, bind III, Egið forlag, Einars Prent. 224 blaðsíður. Prísur: 30 kr.

Út kom nú um dagarnar fyrra bind av Vágs og Porkeris siglingarsøgu í bókarøðini »Føroya Siglingarsøga 1856-1940« við 224 blaðsíðum og nógvum myndatilfari. Seinna og seinasta bind um Suðuroyna skal koma í desember, sigur rithávundin Páll J. Nolsøe.

Høvuðstilfarið er eins og í hinum bókunum fingið burtur úr skjølum, sum Føroya Landsskjalasavn hevur undir hond, men annars er ikki lítið tilfar fingið tilvega úr føroysku blaðsnunum helst frá tíðini aftaná 1900 og úteftir, umframt at Páll Nolsøe eisini hevur verið heppin at fáa forvitnisligar frágreiðingar um ymsar tíðfestar tilburðar frá monnum, ið hava átt beinleiðis lut í hesum. Hann hevur lagt sær nær at fáa so gjøllar, eksaktar, upplýsingar tilvega sum á nakran hátt gjørligt, og hevur hetta ikki minst týdning, tá ið farið skal vera undir at lýsa siglingarsøgu føroyinga út í ættir.

Hvat ið Suðuroynni viðvikir kann ikki verða sagt annað enn, at hetta hevur eydnast honum væl, hóast í summum føroum kanska hann er nakað drúgvur, meðan í øðrum okkurt meir kundi verið at tryggja í. Tað vil so verða, tá ið tilfarið er so rúgvusmikið, sum í hesum føri, men yvirhøvur eru tær frágreiðingar, sum í bókini eru um ávisar hendingar, lesnaðar í stórliga hugtekur hann, ið ans hevur fyri øllum, ið fyriferst á sjónum.

Vágs bygd um ár 1914



Sluppin »Havgásin« — av elstu Vágs-sluppum, ið framvegis er í vinnu (bygd í 1883)

Skip, virki og fyritaksemi

Sum í teimum undanfarnu bókunum greiðir hevundin frá hvørjum skipi sær og søgu tess, eins og hann gevur eina góða mynd av vinnulívsvirkjum og fyritaksemi á teimum plássum, bókin umrøður. Undangongumenn við lit hava teir verið eisini uppi á landi suðuri í Vági og innan føroysku fiskivinnuna slóðbrótarar av teimum fremstu.

Skematiska yvirlitið, ið greiðir fra Vágs-skipum, uppruna og komu teirra til Føroya, fólkið ið mannaði skipini — og tað vóru menn úr øllum Føroyum — og ikki minst persónlýsingarnar eru evnaðar til við skynsemi og bera prógv um, at maðurin, ið savnað hevur tilfarið, hevur fyrstahonds kunnleika til evnið; ikki bert tí, at hann fæst við tilikt arbeiði í dagliga yrki sínum, men eisini, og kanska einahelst, tí at hann sjálvur er suðuroyingur og tí eigur bestu atstøður at greiða just frá hesum parti av oyggjalandi okkara. Vónandi fer hann at verða eins heppin, tá ið hann fer undir at siga frá siglingarsøgunni norðanfyrir; ið hvussu er skuldi keldutilfarið har ikki verið minni at tríva í, og Páll Nolsøe hevur við tí arbeiði, hann longu hevur avrikað, vist at hann eigur serstakt hegni at fáa sum mest burtur úr.

Einki mannaverk er lýtaleyst, heldur ikki hetta; ein saknar eitt evnisyvirlit — registar — og hetta seinasta bókabind stoðgar knappliga við tekstini á blaðsíðu 224 í eini skipafrágreiðing — sum ætlandi heldur fram á blaðsíðu 225 um tveir mánaðar! Slík bók eigur ikki at verða lisin sum ein feuilleton, og hóast bókin er býtt sundur í tvey, hevði ivaleyst borið til at lagt tilfarið so til rættis, at framhaldið í øðrum bindi kom so tilíðandi. Men hetta eru smábrek, sum í komandi útgávum ómakaleyst kunnu verða rættað.

*

Tá ið seinasta bókin um Suðuroynna er komin í desember, eru tilsamans 5 bøkur komnar úr Føroya siglingarsøgu, og síðani verður farið undir Havnina

(framhald á 2. síðu.)

Ólukka á týskum trolara undir Føroyum

Í gjáranáttina kom týski trolarin »Köln« úr Cuxhaven á Havnina við deyðum manni, sum fluttur varð á Dronning Alexandrines Hospital.

Maðurin, 26 ára gamal dekkari, Ebner av navni, ættaður úr Eysturríki, hevði leitað til skips við hesum týska trolara, men meðan trolarin var staddur vestanfyri Mikines hendi ólukka, sum kravdi lívið av tí unga manni. Tvílið var úti, og Ebner var so óheppin at fáa annan arm í wirin. Hann var drigin inn at gálganum og hevdið kom fyri, so at hálsurin gótrumegin nærum varð kvettur av. Lívið stóð ikki at bjarga, og maðurin doyði at kalla alt í einum.

»Köln« kemur aftur á Havnina í kveld eftir likinum at flyta tað til Cuxhaven. — Trolarin hevði fingið 240 kurvar.

Í STUTTUM SAGT —

Landsdystur í fótbólti verður sunnudagin í Kjøpinhavn millum Sovjet og Danmark — radiosent verður.

Undir vitjan J. O. Krags í Moskva hava russar gjørt sáttmála við Burmeister & Wain um byggjan av 4 køliskipum (nýtt slag) fyri tilsamans 100 mill. kr.

Kommunuval vóru í Eysturtýsklandi sunnudagin, 11,5 mill. fólk áttu valrætt, og sagt verður, at 99 pct. atkvøddu fyri kommunistaflokkinum! Ongum gørum flokki var loyvt at stilla upp....

Nýggja borgarliga stjórnin í Noreg við Per Borten úr sentrumsflokkinum á odda tók við í gjár. Uttanríkisministarin er John Lyng úr høgraflokkinum — 2 kvinnur eru við í stjórnini.

Stórt fiskivinnutiltak í Canada

ÍSLENDINGAR BYGGJA FLEST FISKIFOR Í NOREG

Frá tíðindamanni okkara
OSLO, í gjár

Norsk-canadiari, Jens Moe, av navni hevur sett sær fyri at reisa stórvirki innan fiskiónaðan á Prince Edward oynni fram við Nova Scotia strondina.

Ætlanin er at øta upp flakavirki og frystigoymslur. Eisini skulu hesar umframt fisk goyma grønmeti.

Harumframt skal stórur trolarafloti verða bygdur. Aðrenn 1. januar koma 5 nýggjir trolarar at vera í rakstri og hetta tal skal í 1968 vera vaksið til 12. Ætlanin er eisini at keypa fisk frá øðrum.

Nýggja felagið hevur fingið navnið »Gulf Garden Food Ltd«, og norskur kapitalur er uppi í.

Skip til Islands fyri 40 mill. kr.

Ísland er tað fremmandaríki, ið byggir flest fiskifør í Noreg, sigur ársfrágreiðing frá »Norske Båtbyggeres Landsforening«.

Í fjór byggdu íslendingar fiskifør í Noreg fyri tilsamans stivliga 40 mill. kr., meðan Svøriki kom næst, men tó bert við 16,3 mill. kr.

Aður vóru eisini føroyingar fúsir at fáa sær skip úr Noreg, men her tykist steðgur vera komin í, hóast norskar skipasmiðjur fegin vildu hildið fram at smíða føroyingum fiskiskip. Men tað skilst, at føroyski fiskiflotin helst nú eina tíð eigur nóg nógv skip, og annars at føroyingar nú eru vorðnir førir at byggja sjálvir á egnum skipasmiðjum, og tað er so einki at siga til. **H-r.**

Uppreistrarleiðarin tikin í Indonesia

MEN ENN BERJAST TEIR Á JAVA

KUALA LUMPUR, í gjár (AP)

Tað verður nú hildið rættliga vist, at uppreistrarmenn í Indonesia eru niðurbardir flest ástlastaðni, hóast enn bardagar fara fram ymsastaðni á høvuðsoynni Java. Hin Soekarnotrúgvi herurin hevur vent sær móti kommunistunum við stórsta harðskapi, og kommunistar verða jagstraðir um alt landið, tí at herleiðslan vil vera við, at tað vóru kommunistar, sum íbirtu uppreisturin.

Uppreistrarleiðarin, Utung ovasti er eftir sum útvarpið í Djakarta sigur frá, vorðin handtikin á Java, beint sum hann ætlaði sær at flýggja til ein part av oynni, har uppreistrardeildir enn gera um seg.

Utung varð tikin í Tegallandslutinum, har eisini aðrir uppreistrarmenn hava hildið til við tí í hyggju at leita niðan í fjøllini og skógirnar nærindis.

Utung ovasti var púra ókendur, vanligur yvirmaður í livverju Soekarnos, til hann seinast í hinum mánaðanum kom á odda fyri sonevndu »30. september rørsluna«, sum royndi at gera statskvett, koyra Soekarno frá og sleppa kommunistunum framat.

Kvinna er fyri fyrstu ferð vorðin stýrimaður í svenska handilsflotanum, hon er 22 ára gomul og eitur Maria Björnstam, úr Karlskrona. Stýrimannaprógvið tók hon á sjómansskúlanum í Göteborg.

Føroyingar í Eggersø: 100 tons higartil

KOMA HEIM SEINAST Í OKTOBER

Nú útróðrarmennirnir hjá Grønlandsfelagnum og Royndini eru givnir fyri í ár eru einans útróðrarmennirnir á Eggersø á Kappanum eftir í Grønlandi, og teir fara at royna hvenda mánaðan út, um alt gongst eftir vild.

Seinsta ið frætt er úr Eggersø er, at veiðan higartil liggur um 100 tons, ætlanin er at rokka uppi 125 tons, áðrenn hildið verður uppat. Tað eru 12 mans og 1 kvinna úr Føroyum og 2 grønlendingar, ið royna av Eggersø við 3 bátum.

Fiskilisindini hava verið vánalig, og nógvir laur hevur verið, og hóast farið var yvir longu í juni vóru rættilig likindi fyri útróðri ikki fyrr enn í september.

Ætlanin er, at skip skal fara til Grønlands eftir hesum seinastu føroysku útróðrarmonnum 18. oktober.

Columbus-dagen fejret kraftigere end nogensinde

SOM EN DEMONSTRATION MOD NY KORTFUND, SOM SYNES AT BEKRÆFTE, AT NORDISKE VIKINGER KOM FOR HAM TIL AMERIKA

NEW YORK, i gaar (AP)

Titusinder af amerikanere sluttede i aftes loyalt op bag Christopher Columbus og ignorerede de nye vindesbyrd om, at nordboerne kom til America længe før ham. Ud over USA fejredes den aarlige Columbusdag, som om intet var hændt.

Staten New York stillede sig officielt paa Columbus side. Statens lovgivende forsamling bekræftede indkøbet af en stor marmorbuste af Columbus med indskriften »Amerikas store opdagere«.

New Yorks blade var heller ikke meget for at degradere Columbus. »Daily News« paapegede, at hvem der end kom først, saa blev der dog intet uti af nordboernes kolonisering, mens Columbus virkelig aabnede den nye verden.

USAs italiensk-amerikanere svor i aftes, at Yale universitet ikke skal slippe godt fra sit forsøg paa at frakende Christopher Columbus æren af at være Amerikas opdager. Yale universitetet advaredes om, at Columbus ville blive hævnet.

»Vi skal give Yale noget at tænke paa«, erklærede John N. la Corte, formand for det italienske historiske selskab i New York. »Yale vil komme til at fortryde....«

la Corte bebudede, at baade Vatikanet, The National Geographic Society i Washington og amerikanske historikere verden over vil blive mobiliseret til et felttog, der skal gøre det af med Yale-professorernes offentliggørelse af et gammelt landkort, hvormed de erklærer at have fundet beviset for, at de nordiske vikinger opdagede Amerika (Vinland) længe før Columbus.

Vaabensmugling til Mellemøsten

LOVE SAT TIL AT SKRÆMME MYNDIGHEDERNE BORT

ROM, i gaar AP)

Politiet i Rom har i udkanten af byen opdaget et privat vaabendepot i en villa, der blev bevogtet af en løve, og som menes at have været en transitcentral for vaabensmuggling fra Vesttyskland til Mellemøsten.

Den 31-aarige Gianfranco Corsi, der bor i villaen, og som driver en butik for teater-rekvisitter, er blevet arresteret sammen med den 59-aarige Garibaldi Malgherini, der ejer en vaabenforretning i Rom.

Løven, som Corsi brugte til at bevogte villaen, sad i et bur ved indgangen. Politiet mener, at det har været meningen, at dyrets brøl skulle holde uvedkommende borte fra villaen, der indeholdt rifler, maskinpistoler, haandgranater og bazookagranater nok til at udruste et helt kompagni i hæren.